# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Guri Tórsdóttir Hansen:

## Spildurnýggjan Swift fyri 50 krónur

Í eina tíð hevur ein svartur Suzuki Swift staði uttan fyri hjá Berg Motors á Hálsi við áskriftini ”Ársins lutaseðil til frama fyri B36”. Týsdagin 1. mai dróg „Notarius Publicus“ so Ársins lutaseðil, og vinnaraseðilin var nr. 06994.

Hósdagin 10. mai var so bilurin handaður tí hepna vinnaranum Guri Tórsdóttir Hansen í Havn. Tað var 12 ára gamli Regin Joensen, sum fyri Berg Motors og B36 handaði Guri skrásetingarskjalið og lyklarnar til tann svarta Suzuki Swift 1,5i til eitt virði uppá kr. 157.990.

Orsøkin til at tað var Regin sum handaði Guri bilin, var at tað var júst hann sum fyri jól í fjør hevði selt henni lutaseðilin. Tey búgva í sama grannalagi. Guri keypti bert tann eina seðilin.

Guri sigur, at hon hevði faktiskt býlagt sær ein annan bil av einum øðrum merki, tá hon varnaðist, at hon hevði vunnið Suzuki bilin. Hetta kom sera væl við. Tað kennist bara so løgi at fáa ein heilan bil fyri 50 krónur, sigur ein ovurfegin Guri Tórsdóttir Hansen.



*Tað var 12 ára gamli Regin Joensen, sum fyri Berg Motors og B36 handaði Guri Tórsdóttir Hansen skrásetingarskjalið og lyklarnar til tann svarta Suzuki Swift 1,5i til eitt virði uppá kr. 157.990,-*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



Føroya Ellisakfør:

## Gomul akfør til Hvannasunds

Eins og undanfarin ár skipar áhugafelagið Føroya Ellisakfør fyri útferð við gomlum akførum Kristi himmalferðardag. Hesaferð gongur leiðin til Hvannasunds tann 17. mai

Í tíðindaskrivi sigur formaðurin í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør Eirikur Ólason Simonsen, vegna nevndina í felagnum: ”Møtið fjølment Kristi himmalferðardag hin 17. mai kl. 10.00 stundisliga. Við ella uttan ellisakførum í felagshølinum yviri við Strond 22. Ferðin gongur norður í Hvannasund har vit m.a. vitja motorsavnið, eisini verður okkurt til matna”.

Heimasíðan hjá Føroya Ellisakførum: www.ellisakfor.com

Ivan Johansen Bilar:

## Fleiri nýggjheitir í bilasølustevnuni

Eins og undanfarin ár verður bilasølan “P/F Ivan Johansen Bilar” við á bilasølustevnuni, sum verður í KÍ-høllini í Klaksvík í vikuskiftinum.

Í tíðindaskrivi frá P/F Ivan Johansen Bilum verður sagt at fleiri av nýggju sniðunum vera við á stevnuni, sum t.d. nýggi Mitsubishi Outlander, Citroën C4 Picasso umframt eitt stórt úrval av øðrum bilum sum t.d. Chrysler og Jeep, sum eisini verða væl umboðaðir hesaferð.

Sosialurin -har tað hendir

### Føðingar

30. apríl fingu Jóna Jacobsen, Kvívík og Søren Magnussen, Tjørnuvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

2. mai fingu Vima og Bjarti Nattestad, Lopra, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3610 gr.

3. mai fingu Maibritt og Bethuel Johannesen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 5000 gr.

3. mai fingu Esther og Sveinur Thomasen, Miðvágur, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4600 gr.

4. mai fingu Guðrið Viderø Zachariasen og Virgar Zachariasen, Sandur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

5. mai fingu Vár Egholm og Johan Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3350 gr.

5. mai fingu Laurina W. Niclasen og Bárður Olsen, Sandur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

6. mai fingu Johanna S. Jonhardsdóttir og Brynjolv Gert Nicolajsen, Skopun, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3100 gr.

7. mai fingu Sigrun av Vollanum og Jón Brekku, Signabøur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3800 gr.

9. mai fingu Laila og Jóan Petur Hentze, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3800 gr.

**Prógv**
Paulina Dam, Klaksvík, hevur tann 25 apríl 2007 lokið prógv í HD Roknskapi og Búskaparstýring, á Handelshøjskolecentret, Syddansk Universitet.

**Konfirmatión í Danmark**
Sunnudagin 13. mai konfirmerast í Sdr. Virum kirkju Ásvør Rasmussen, dóttir Katrin og Adrian Rasmussen.

Sunnudagin 13. mai 2007 konfirmerast í Filskov kirkju Finnur Hentze, sonur Inga Hentze Hoyvík. Adressan er: Postgade 12, Filskov, 7200 Grindsted, Danmark

Sunnudagin tann 13. mai, konfirmerast í Fasterholt kirkju Andy Andreasen, sonur Rósu Andreasen og Victor Olsen, Ejstrupvej 16, Fasterholt, 7330 Brande

Sunnudagin 13. mai verður Annfríð Dam Kulmbach, dóttir Estrid og Jacob Kulmbach, konfirmerað í Fjelstrup kirkju kl. 10.15. Adr. Præstevænget 8, Fjelstup, 6100 Haderslev.

**Konfirmatión í Noregi**
Sunnudagin 13. mai konfirmerast Anja Therese Solbakk, R.C. Effersøesgøta 12, Tórshavn, í Røldal kirkju.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 11. maj giftast á Ráðhúsinum í Århus Guðrið H. Petersen og Ólafur G. Haraldsson, brúðaradressa; Moltkesvej 10, st.tv. 8260 Viby J. Danmark.

Leygardan 12. mai kl. 13 giftast í Evangeliihúsinum í Tórshavn Eydna Christiansen og Jón Johannesen, bæði úr Tórshavn. Móttøka verður í Evangeliihúsinum frá kl. 14 til kl. 18, og øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 12. mai giftast í Býráðssalinum í Havn Anna Kari Müller, Tórshavn og Carsey Bjartalíð, Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum.

Leygardagin 12. mai giftast í Varde byrådssal Iris á Argjagarði og Kim Dejsgaard. Adr.:Torvegade 26 6800 Varde.

Leygardagin 12. mai giftast Nomi Højgaard, Tórshavn og Johannes Laursen, Rønbjerg. Dagurin verður hildin fyri innbodnum í Glyngørehallen, 7870 Glyngøre.